


### Anton Jørgensen:

# Danski skiparin, sum eigur tvær konur í kirkjugarðinum




**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo


**Teir allarflestu skiparar við føroyskum fiskiskipum hava verið føroyingar. Men eitt undantak longu fyri meira enn 100 árum síðani var Anton Jørgensen, sum eisini var við til at stovna Skiparafelagið í 1896**

Tað, sum hevur fingið Anton Jørgensen til Føroya, er væl saktans, at hann varð giftur við føroyskari konu. Tey búðu úti í Grind í Havn.

Anton Jørgensen var føddur 18.juli 1864 í Søllested á Lollandi Hann var tvær ferðir giftur og misti báðar konurnar, ið vóru systrar, á ungum aldri. Fyrra konan æt Ata Maria Hansen f. 25. mars 1865. Tey vórðu gift 18. desember 1890 í Havnar kirkju, men hon doyði longu 6. november 1892.

Tey fingu Petur Vilhelm f. 30.8. 1891, fermdur í Havnar kirkju 1. oktober 1905.

Seinna konan Anna Malena Hansen varð fødd 1. mai 1862. Tey vórðu gift í 1895. Hon doyði 22. juli 1904 frá fýra børnum. Børn hjá teimum vóru í hvussu er Karl Adolf Mourensius f. 8.10 1896 og Sofus f. 20.7 1899. Alt húskið flutti nakað skjótt til Danmarkar, har tey eisini eru deyð. Um nakar av ættini í Føroyum veit meira um, hvat ið hendi teimum, hevði tað verið áhugavert at frætt.

Pápi báðar konurnar var Petur Hansen í Árnafirði í Havn. Hann var føddur 11. august 1834 í Havn og druknaði 16.7.1878. Mamman var Katrinu Sofíu f. Høgnesen av Skála. Hon var fødd 10. oktober 1830. Tey vórðu gift í Havnar Kirkju 25. august 1858.

Petur og Cathrina Sofía fingu í hvussu er trý onnur børn.

**1.** Andrea Maria f. 11. juli 1859 giftist við Christian Ludvig Magnussen f. 2. juni 1853 á Skála. Tey fingu í minsta lagi børnini Johanna Petrina f. 1884, Høgnina Anna Malena Maria f. 1886 og Johannes Sofus f. 1889.

**2.** Tann 25. oktober 1869 fingu Petur og Cathrina Sofía dótrina Hansinu Johannu Christinu Louisu

**3.** Í 1873 fingu tey eina deyðfødda gentu.

**Gjørdist skipari**

Anton Jørgensen var stýrimanslærdur og fór seinast í 1880-unum at sigla við skonnartini Frederiksvaag hjá M.C. Restorff í Havn. Skipari var sonur hansara Johan, "kapteinurin". Frederiksvaag var brúkt bæði til sigling við farmi og til fiskiskap.

Anton Jørgensen var við Frederiksvaag til 1890. Seinni hetta árið og árið eftir fiskaði hann við sluppini Beautiful Star, sum brøðurnir Jens, sum var skipari, og Poli í Dali áttu saman við Hanus Hansen úr Nólsoy.

Í 1892 varð Anton bestimaður við skonnartini Florence hjá bretska skiparanum Robert Darling, sum eina tíð búði í Havn.

Tá ið Sámal Peter Petersen í Fuglafirði keypti hana á heysti 1892 fór Anton at føra hana.

Florence hevði tá fingið skaða, og varð umvæld í Vestmanna. Anton fór eftir henni, tá hon var umvæld og var síðan ein stuttan túr við henni úti undir Føroyum, hóast seint var til árs.

Jákup í Jógvansstovu úr Lorvík hevði í Siglingarsøguni frá pápa sínum Sámali eina frásøgn frá túri við Florence, táið teir fara til Noregs at landa saltfisk. Á vegnum heim fáa teir ein sjógv og ein maður fer fyri borð, teir hildu tað vera skiparan. Tað vísti seg, at Anton hevði bjargað sær við at leypa niður í kappan. Tað var Óli Petersen, sum var útsligin. Tað varð sjálvsagt alt gjørt fyri at bjarga Óla. Hetta eydnaðist eisini. Óli kom so mikið nær, at Sámal fekk um skøvningin á Óla, og var hetta eitt handatak, sum kom at merkja vinskap teirra millum fyri lívið. Ferðin kundi so halda fram, og komu teir á Fuglafjørð til jóla.

**Millum teir fyrstu við Rockall**

Føringatíðindi skrivar 7. juni 1894, at Florence var nýliga komin aftur frá Rock All við góðari veiðu. Annars varð fiskað bæði undir Íslandi og Føroyum. Anton Jørgensen førdi hana til og við 1896.

Árini 1898 til og við 1901 førdi Anton Jørgensen sluppina Prosperous, sum A.W. Restorff, keypmaður í Havn, sonur gamla Restorff, og Poul Niklái Danielsen, skipari úr Nólsoy, høvdu keypt í juli mánaði 1890. Óli Svenden í Havn – Óla Svenn kallaður, hevði ført Prosperous til 1898.

Árini 1903 til og við 1906 førdi Anton Jørgensen sluppina Spurn, sum hann í 1903 gjørdist partaeigari í. Christian M. Christiansen keypmaður í Havn – kallaður Christian hjá Ludda – og Christian Christiansen, skipari og kgl.loðsur í Havn, kallaður Christian í Dali høvdu keypt Spurn í mars mánaði í 1895.

**Var við til at stovna skiparafelagið**

Anton var 4. januar 1896 við til at stovna Færøernes Skipperforening, sum seinni gjørdist til Føroya Skipara- og Navigatørfelag. Han sat í nevndini 1896-1901, í 1904, í 1906 og 1908 og var formaður í 1901 og 1906. Tað sær út, sum at hann fleiri ferðir er farin úr og inn í nevndina, hvør orsøkin so hevur verið til tess.

14 dagar eftir stovningarfundin var aðalfundur hildin í felagnum, har nevndin legði fram uppskot til viðtøkur, sum vóru einmælt samtyktar. Stovningarárið varð bert ein fundur hildin aftur, og tað var í november. Sagt verður, at Anton Jørgensen var serliga virkin á hesum fundi. Hann hevur uttan iva verið ein góður stuðul hjá felagnum í eini tíð, tað ikki var so lætt at arbeiða við felagsskapum sum nú.

**Flutti av landinum**

Anton Jørgensen flutti í 1907 ella 1908 til Danmarkar saman við børnunum. Hann førdi skip í farmasigling til heilsan fór at bila. Í 1909 førdi hann S/S Kjøge og var á Havnini við honum 8. mai á veg til Íslands, og 12. maj søkti Kjøge neyðhavn á Fuglafirði.

Albert í Horni sá Anton aftur í 1917. Hann var tá við einum skipi, sum æt Abba, ein skonnart, sum flutti fisk úr Íslandi til Spanien. Teir máttu steðga á í Gibraltar fyri at fáa loyvi at koma inn í Miðalhavið. Dagin eftir, sum teir komu til Gibraltar, kemur ein jolla rógvandi. Tað vóru fimm mans í jolluni. Albert helt seg kenna tann eina mannin aftur beinanvegin. Tá var tað Anton Jørgensen, sum hann hevði siglt saman við. Hann var farin dagin fyri frá Gibraltar við skipi og varð niðurskotin uttanfyri.

Tá Sanna varð keypt til Vágs í 1930, var Anton Jørgensen við sum ferðamaður sambært Marius Absalonsen av Viðareiði.

Tíverri finst neyvan mynd av Anton.

**Keldur:**
Páll Nolsøe, Jógvan Arge og Viggo Christiansen



*ANNA JØRGENSEN F. HANSEN*
*F. 1. MAJ 1862 D. 22. JULI 1904*
*ELSKET OG SAVNET*



*HERUNDER HVILER EN TROFAST HUSTRU OG MODER ADA MARIA JØRGENSEN*

*FØDT HANSEN*

*F. 25. MARTS 1865*
*D. 6. NOVEMBER 1892*

*ALTID I MODGANG SAGTMODIG DU VAR*

*MODGANGENS DAGE TAALMODIGT DU BAR*

*DERFOR HERREN I HIMLEN DIG LØNNE*

*DU GLÆDES BLANDT ENGLENE SKØNNE*



*Óli Petersen mundi endað lívið við Florence*



*Sum við einum fekk Sámal í Jógvanstovu um hondina á Óla. Hest sæst Sámal saman við konuni Margrethu og soninum Jákup*



*Florence, sum Anton førdi*

**Komandi partur**
Komandi hósdag, skírisdag, kemur einki blað. Tí verður næsti partur eftir páskir, og hann verður um R. Michael Jacobsen, Mikk í Dávastovu, sum fekk fyrsta fótbólksskaða í Føroyum.